# niðan í líðina



## Nógvur kavi í 1947

Nógv eldri fólk minnast tað tiltikna kavaárið í 1947. Tað gera kunoyingar eisini.
Her kom sera nógvur kavi niður, - í roynd og veru so nógvur, at fólk í teimum norðaru býlingunum í Kunoy fluttu suður í bygdina.
Fólk óttaðust rætt og slætt fyri at skalvur skuldi leypa úr fjallinum beint omanfyri bygdina.
Fluttu tey longur suður í býlingarnar har, var tann vandin av. Tíbetur kom einki skalvalop tá.
Aðrir kunoyingar minnast somuleiðis nógvan kava í bygdini, tá teir vóru smádreingir. Kavin var so nógvur, at teir tók skíðirnar fram og skíðaðu oman móti bygdini.
Skíðirnar tá í tíðini vóru ikki eins og tær ein fær í dag: Dreingirnir gjørdu sær skíðir úr tunnustavum, og við teimum fóru teir niðan móti norðasta hamarinum í bygdini og skíðaðu hagani allan vegin oman móti skúlanum í bygdini.
- Tað vóru dagar!, sum ein teirra tekur til.

*- Skalvalopini eru helst komin mestsum í einum, sigur kunoyingurin Jaspur Kruse*
*Mynd: Høgni Thomsen*

hjá teimum maskinunum sum vóru byrjaðar at rudda eitt sindur.

**Sluppu til bygdina**
Fólk í Kunoy helt seg bert innanveggja í hesum vánaligu líkindunum.
- Eg hevði so eingi neyðsynarørindi at gera, og hevði heldur ongar ætlanir um at fara av bygdini.
- So eg var bara verandi við hús, sigur Jaspur, sum

> ” *Ein hugsar altíð um, at ein koyrir í brattlendi, sigur hesin kunoyingurin.*

fyrrapartin í dag var farin at geva seyðinum.
Tað vísti seg kortini, at m.a. onkur kvinna úr bygdini var stødd í Klaksvík og mátti sleppa aftur til húsa og til børn síni um kvøldið.
Hesi vóru millum tey fáu, sum sluppu at koyra eftir Kunoyarvegnum hetta kvøldið.
Í roynd og veru vóru kunoyingar innibyrgdir alla hesa náttina. Ikki fyrrenn eftir middag sunnudagin var koyrandi aftur sum vanligt.

**Hyggja niðan í líðina**
Kunoyingar eru tó vitandi um, at um veturin kemur tað meiri enn so fyri at grót ríður oman á vegin - og skalvalop!
Onkutíð eisini rættiliga stór skalvalop verið á Kunoyarvegnum.
Jaspur Kruse greiðir frá, at í 1988 - tað er: nakað áðrenn hann sjálvur flutti til bygdina - var eitt rættiliga stórt skalvalop á Kunoyarvegnum.
- Eg havi hoyrt menn tosa um, at hetta var tættari bygdini enn hetta seinasta skalvalopið, og var haraftrat nógv størri, sigur hann.
Hvørki við hetta skalvalopið sum var 18. februar í 1988, ella hetta seinasta 20. januar 2007, hoyrdist nakað til skalvalopið. Hevði talan hinvegin verið um skriðulop við gróti og eyri høvdu fólk helst hoyrt til tað.

**Hyggja oftari**
Teir eru vitandi um skalvalop á sjálvum Kunoyarvegnum, men einki um skalvalop inni í sjálvari bygdini.
Hóast høgt fjall - Lítlafjall teir kalla - er beint omanfyri bygdina, og bygdin er umgyrd av brøttum skorum og homrum, hevur tíbetur einki skalvalop verið inn yvir sjálva bygdina.
Hóast hesar umstøðurnar er bygdarfólkið ikki bangið fyri at koyra til og frá bygdini.
Sum eitt teirra tók til í morgun:
- Noy, eg eri ikki bangin fyri at koyra til og úr bygdini. Vegurin og tunnilin eru góð at koyra eftir, eingin ivi um tað.
- Men sjálvandi, ein hugsar altíð um at ein koyrir í brattlendi, sigur hesin kunoyingurin.



*Ein kunoyingur var farin at geva seyðinum. Teir skulu eisini hava sítt, hóast tosið manna millum helst er um annað enn seyð í morgun*
*Mynd: Høgni Thomsen*



*Hóast skorar, hamrar og brattlendi eru kring Kunoy, vita menn ikki at siga frá nøkrum skalvalopi inni í sjálvari bygdini*
*Mynd: Høgni Thomsen*